## Nútímans útróðrarbátur

Útróðrarbátarnir broyta bæði snið og stødd. Fyri nøkrum døgum síðani kom nýggi báturin Háey II til Húsavíkar í Íslandi. Báturin, sum er smíðaður á bátasmiðjuni Samatak á Hafnarfirði, er av slagnum Víkingur 1200. Hann er, sum myndin vísir yvirdekkaður, og merktur14,9 tons. Hann hevur 720 hesta maskinu av slagnum Yanmar og alla nútímans útgerð. Báturin hevur eisini Mustad egningarmaskinu við 21.000 húkum.



## Skeið í matvørureinføri

Í samstarvi við D&G Skeið skipar Fiskivinnuskúlin í Vestmanna fyri skeiði í matvørureinføri. Skeiðið, sum verður í døgunum 3. til 5. september, er ætlað fólkim, ið starvast við matvørum. Tað eru Drós í Ólavsstovu og Gudna á Rógvi Joensen sum halda skeiðið, sum verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í Havn. Kostnaðurin fyri skeiðið, sum endar við próvtøku, er 4000 krónur.

Astrup:

# Rætt at gera Føroyar til eitt valdømi



**Formaðurin í Búskaparráðnum, Jørn Astrup Hansen tekur undir við, at Føroyar gerast eitt valdømi. Verður uppskotið ikki samtykt verður løgtingið eitt kommunalt sendimannating.**

EITT VALDØMI

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Í farnu viku legði Edmund Joensen, tingformaður fram uppskot fyri tingið um at gera Føroyar til eitt valdømi. Sosialurin kunngjørdi í blaðnum fríggjadagin, at heili 54% eru fyri einum valdømi umframt at 19 av tingmonnunum ætla sær at atkvøða fyri uppskotinum. Blaðið hevur spurt formannin í Búskaparráðnum, Jørn Astrup Hansen, sum hevur havt góðan møguleika at fylgja við gongdini í Føroyum sum stjóri í Føroya Banka og í seinastuni sum formaður í hesi týðandi ráðgevandi nevndini, hvat hann heldur um uppskotið hjá tingformanninum.

Jørn Astrup Hansen er sera avgjørdur. – Ongantíð ov skjótt er tað fyrsta svarið vit fáa frá honum. Hann leggur aftrat, at tørvur er á, at vit í Føroyum fáa eitt, og hann undirstrikar, bara EITT valdømi.

– Eitt valdømi fer at medvirka til, at vit fáa ein tiltrongdan skilnað millum landspolitikk og kommunalpolitikk. Vit mugu fáa landspolitikarar í løgtingið, um løgtingið ikki skal útvikla seg til eitt sendimannating av kommunalpolitikarum.

Formaðurin í Búskaparráðnum heldur fyri, at við sjey valdømum er tað væl ikki nøkur orsøk til at hava kommunur í Føroyum, og fyri sær at síggja stendur valið millum eitt løgting, hvørs limir verða valdir í einum valdømi, og 5 til 7 kommunur, ELLA eitt løgting valt í sjey valdømum og eina avtøku av kommunum.